# »Med lov skal land bygges«

RANDI Í JÓGVANSSTOVU



Hetta stendur skrivað á einum gomlum bygningi niðri í Keypmannahavn. Tað skuldi so tryggjað okkum, at lógir, ið verða gjørdar her, eiga at byggja samfelagið upp og ikki bróta tað niður. Vit vilja jú eisini byggja land við lóg, ella hvussu?

Tá partur av kommunustýrinum í Leirvík kærdi borgarstjóran til Innlendismálaráðið fyri at brúka borgarans pengar í heimildarloysi, vóru vit fyrst noydd at bíða í fimm mánaðir, og síðan fingu vit ein slutur fyri ein slatur. Ikki einans reingir Innlendismálaráðið sannleikan, men fer eisini so langt sum at síggja burtur frá kommunustýrissamtyktini frá 29. mai 2006, har einmælt varð samtykt at fylgja samtyktini frá fíggjarnevndini:

Fíggjarnevndin mælir til at seta 150.000 kr. av til planlegging av havnarøkinum í sambandi við vegagerðina (sum varð samtykt av Føroya Løgtingi tann 16. mai 2006).

Kommunustýrið í Lerivík hevur ongantíð samtykt at gera ein bátahyl inni á Toftanesi.

Eingin lóg verður brotin sambært Innlendismálaráðnum, alt er í skjønnasta ordan, hóast teir eru væl vitandi um, at arbeitt verður av øllum alvi við at bróta løgtingslógina um vegaføring um Leirvík. Hvar er Landsverk í øllum hesum? Hví fara teir ikki í gongd? Hvønn er tað, sum teir ræðast so illa?

So stutt sagt til tykkum í Innlendismálaraðnum: Eg gevi einki fyri tað svarið, vit, ið kærdu, fingu. Tit góvu málinum eina politiska viðgerð, blástu lógini ein langan marsj og geva grønt ljós fyri at halda fram við at bróta lógina í Leirvík.

»Uhyggen breder sig«. Er nøkur skomm eftir í kroppinum á tykkum, eiga tit at taka tykkum saman og geva kæruni eina objektiva viðgerð. Um ikki tit virða lógir landsins, verður vindandi galið her á landi.

Við vón um, at rættvísi er galdandi fyri øll.

# Olshana kontra korallir

JAN SØRENSEN
leiðari, Havlívfrøðiliga royndarstøðin (BIOFAR)

Síðan russkiski trolarin Olshana rendi á Flesjanar, og síðan sakk, hevur verið tosað um at fáa oljuna úr skipinum, at byrgja fyri eini møguligari umhvørvisvanlukku. Kostnaðurin fyri at fáa oljuna úr skipinum er mettur til um 1. mió kr um dagin, og at tað fer at taka upp í tvær vikur. Hetta gevur ein samlaðan kostnað upp á 14 mió. kr, umframt tað sum tað almenna annars kostar (samb. B. Kalsø um 4 mió. higartil).

Tosað verður um eina møguliga umhvørvisvannlukku.

Á náttúrusíðuni hava vit eitt annað nógv størri mál, sum ikki verður tosað so nógv um. Tað er føroysku koralleiðirnar. Fiskiskapur (trolarar serliga) hevur tey seinastu 100 árini oytt koralløki, sum vóru fleiri ferðir so stór sum alt føroyska landaøki. Hetta er ein føroysk náttúruvannlukka, sum minnir um frumskógartýningarnar í tropisku londunum, og sum eingin gevur sær fær um.

Peningur til náttúru og umhvørvisvernd er avmarkaður, og tí er neyðugt at raðfesta hvussu vit á besta hátt nýta hendan pening. Fyri 14 mio. kr høvdu vit kunna gjørt eitt munagott arbeiði at kortleggja allar koralleiðirnar, staðfest støðu teirra og harvið lagt eitt gott støði til hvussu vit í framtíðini á besta hátt umsita okkara mest fjølbroyttu búlendi.

Endaviðmerking: enn eru stór øki við korallum, men við núverandi gongd, verður ikki leingi til alt er horvið.

# Svimur og kavar 90 ára gomul

FØÐINGARDAGUR
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Sigga Olsen, morgunfrúa, varð heiðrað í kantinuni í Svimjihøllini í morgun*

Tórshavnar kommuna bjóðaði mikumorgunin 12. september til samkomu í kantinuni Svimjihøllini í Gundadali í sambandi við at ein av morgunfrúunum, Sigga Olsen, fylti 90 ár leygardagin 8. september.

Hóast høga aldurin er Sigga sera væl fyri og altíð í góðum lag. Nakrar ferðir um vikuna svimur hon í Svimjihøllini saman við hinum morgunfrúunum, har hon ofta er síggja á ovastu vippu.

Umframt morgunfrúurnar vóru familja og vinir komin til hugnaløtuna í Svimjihøllini, har borgarstjórin Heðin Mortensen heiðraði hana, og gav henni onkra gávu.

Sigga er ættað úr Sørvági, men hevur búð í Havnini meginpartin av lívinum. Hon hevur svomið síðan hon var heilt ung.

**mg**



*Hóast Sigga hevur fylt 90 ár, er hon framvegis at síggja á hægstu vippu í Svimjihøllini*



*Umframt morgunfrúurnar vóru familja og vinir komin til hugnaløtuna í Svimjihøllini*

# Coachguru til Føroya

FYRILESTUR
*Tíðindaskriv*



*Flemming Østergaard*

Jens Kramer Mikkelsen, fyrrverandi yvirborgarstjóri í Kepmannahavn, kemur ikki til Føroya sum ætlað hesaferð. Hann skuldi annars saman við Flemming Østergaard, formanni í Ítróttarparkini í Keypmannahavn halda fyrilestur á Hotel Føroyum í annaðkvøld, sum FC-Amager skipar fyri.

Men í staðin fyri hevur tað eydnaðst FC-Amager at fáa navnframa rithøvundan, coach og vinnuspykologiska ráðgevan, Frank Johansen at koma.

Tað er vegna sjúku í familjuni, at Jens Kramer Mikkelsen gav avboð.

- Vit eru heppin, at Frank Johansen og Kenneth Munk Petersen kundu koma í staðin og halda ein fyrilestur, sum er eitt sindur meira enn tað vanliga, sigur FC Amager í tíðindaskrivi.

Frank Johansen er ein guru í coachbransjuni í Danmark og hevur meira enn 25 ára royndir sum coach. Kenneth Munk Petersen hevur somuleiðis stórar royndir, hann hevur verið stjóri bæði á danska og á altjóða marknaðinum.

Báiðr hava stórar royndir við vinnulívsleiðarum og fremstu ítróttarfólkum, m. a. hevur Frank Johansen verið ráðgevi hjá Toda Jónsson.

- Vit harmast sjálvandi, at Jens Kramer Mikkelsen gav avboð, men sjúku kunnu vit ikki broyt, men hinvegin eru vit stolt yvir, at vit upp á so stutta tíð kunnu fáa so kompetentar avloysarar til fyrilesturin, sum verður sera spennandi, sigur FC Amager.

Fyrilesturin, sum FC Amager og Team Føroyar Business Club skipa fyri, verður á Hotel Føroyum í annaðkvøld kl 17.